# MB Tours

MB Tours hevur sítt heim á Bryggjabakka 2 niðri í Vágsbotni í Havn. MB Tours er ein ferðaskrivstova, sum fæst við at fáa útlendsk ferðafólk til okkara vøkru oyggjar.

MB Tours tekur sær serliga av ferðamannaskipum, sum koma til landið, og í summar fær ferðaskrivstovan heili 22 ferðamannaskip á vitjan í Føroyum. Gestirnir á hesum 22 ferðamannaskipunum vera á leið 18000 í tali, so Magni Mouritsen og MB Tours fáa úr at gera ígjøgnum summarið.

MB Tours bjóðar øllum ferðafólkunum, sum koma til Føroya, ymsikar túrar kring landið. Sjálvt um skipini ikki liggja so leingi við kei í Havn, so fáa gestirnir altíð høvið at síggja ein part av okkara landi.

MB Tours skipar m.a. fyri gongutúri, har ferðafólkini fyrst vera koyrd niðan á Oyggjarvegin. Haðani ganga tey niðan á Streymoyarsylluna, har náttúran er sera vøkur og sermerkt. MB Tours kann eisini syrgja fyri, at útlendsku gestirnir sleppa ein túr við Norðlýsinum, ein túr undir Vestmannabjørgini ella ein túr út í Havnardal at ríða.

Flestu túrarnir, sum MB Tours bjóðar ferðafólkunum, eru tó við bussi. Her vera ferðafólkini koyrd til m.a. Vágar, Kvívíkar, Eiðis, Gjáar og Gøtu, og so steðgar bussurin á teimum støðum, sum eru spennandi og sum gestirnir vilja síggja. Á henda hátt sleppa útlendsku gestirnir at uppliva ein part av okkara landi.






















